# Kvívíkar skúli

## Skúlaárið 2018-2019:



**Kvívíkar skúli**

**Tlf: 292422**

**Teldupost: kvi@skulin.fo**

**Heimasíða: www.kvivikarskuli.fo**

## Góðu foreldur:

Kvívíkar skúli skal vera eitt gott arbeiðspláss hjá næmingum, lærarum og starvsfólkum, har høvuðsuppgávan skal vera at arbeiða fyri læring, menning og vøkstri fyri øll.

Fyri at røkka hesum máli, eiga næmingar og lærarar skúlans at virka fyri, at øll kenna seg trygg, trívast og hava virðing hvør fyri øðrum.

**Atferðarreglur:**

- Næmingarnir skulu møta rættstundis og væl fyrireikaðir til tímarnar.
- Í tímunum skal vera arbeiðsfriður.
- Øll skulu hava fyrilit hvør fyri øðrum, bæði á skúlaøkinum og uttanfyri.
- Øll skulu tosa virðiliga við hvønn annan.
- At kasta kavabløk er bert loyvt á vøllinum.
- Kravt verður, at øll fara væl um skúlan, innbúgv, bøkur og tilfar.
- Kravt verður, at næmingarnir bera seg fólkaliga at – bæði mótvegis øðrum næmingum, lærarum og starvsfólkum skúlans.

**Skúlin væntar eisini, at foreldur/avvarandi gera sítt til:**

- At næmingarnir koma í skúla væl fyrireikaðir, úthvíldir og hava etið morgunmat.
- At næmingarnir kenna ábyrgd og virðing fyri skúlanum.
- At skúlin verður positivt umrøddur.
- At foreldur/avvarandi taka á seg ábyrgd av skúlagongdini hjá barninum øll skúlaárini.
- At foreldur/avvarandi seta seg í samband við skúlan um ivamál eru.
- At næmingarnir **altíð** skulu hava svimji/ítróttarklæðir og handklæði við til ítrótt/svimjing.
- Frávera skal fráboðast til flokslæraran áðrenn kl. 9:30.
- Boð heim. Um børnini hava tørv á at fáa boð heim, so kunnu tey venda sær til lærara, flokslærara ella skúlaleiðaran.
- Næmingarnir kunnu hava inniskógvar við í skúla. Skógvarúm er í durinum.

**Loyvt er ikki:**

- At fara av skúlaøkinum í skúlatíðini uttan loyvi.
- At nýta súkklu, rennifjøl o.t. á skúlaøkinum.
- At nýta fartelefon í skúlanum.
- At hava góðgæti við í skúla.
- At hava við sær í skúla lutir, ið kunnu vera teimum sjálvum ella øðrum at meini.

**Floksskipan, floksstovur og flokslærarar.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. flokkur: | Norðurstova | Flokslærari: Hallgerð L. Hansen |
| 2. & 3. flokkur: | Niðristova | Flokslærari: Tórarinn N. á Rípuni |
| 4. & 5. flokkur: | Uppistova | Flokslærari: Maj-Britt Jacobsen |
| 6. & 7. flokkur: | Frammistova | Flokslærari: Turið á Tórgarði |

| **Starvsfólk:** | **Tlf.:** | **Teldupost:** |
|---|---|---|
| Høgni V. Warberg, skúlaleiðari | 292422 | hoegni.warberg@skulin.fo |
| Hallgerð L. Hansen, lærari | 723368 | hallgerd.l.hansen@skulin.fo |
| Tórarinn N. á Rípuni, lærari | 515701 | torarinn.niclasen@skulin.fo |
| Maj-Britt Jacobsen, lærari | 224501 | maj-britt.jacobsen@skulin.fo |
| Turið á Tórgarði, lærari | 226114 | turi.a.torgardi@skulin.fo |
| Malan Petersen, lærari | 522019 | mp2401x8@skulin.fo |

Aðrar uppgávur:

KT-vørður og SSP: Høgni Warberg, leiðari

Lesivegleiðari og bókavørður: Tórarinn N. á. Rípuni.

Lestrarvegleiðari: Augusta Petersen

**Tey, sum manna skúlastýrið frá 1. januar 2017, eru:**

| | Umboðar | Telefon | T-postur |
|---|---|---|---|
| Sunrit Niklasdóttir, forkvinna | foreldur | 29 22 58 | sunrit.niklasdottir@skulin.fo |
| Nelly D. Christiansen, varaforkvinna | foreldur | 50 60 64 | nelly@pm.fo |
| Marjun Danielsen | foreldur | 22 33 56 | marjun.danielsen@skulin.fo |
| Ragnar Isaksen | kommununa | 50 90 50 | ragnar@bulur.fo |
| Vivi Davidsen | kommununa | 23 19 98 | vivi@faroeagency.fo |
| Tórarinn N. á Rípuni | lærarar | 27 35 06 | torarinn.niclasen@skulin.fo |
| Høgni Warberg | skúlaleiðari | 29 24 22 | hoegni.warberg@skulin.fo |

## Frítíð og frídagar í skúlaárinum 2018/2019:

| | |
|---|---|
| Summarfrítíð: | mikudagin 27. juni - mikudagin 15. august |
| Heystfrítíð: | leygardagin 13. oktober - sunnudagin 21. oktober (vika 42) |
| Jólafrítíð: | fríggjadagin 21. desember – sunnudagin 6. januar |
| Páskafrítíð: | leygardagin 13. apríl – mánadagin 22. apríl |
| Flaggdagur: | hósdagin 25. apríl |
| Dýri Biðidagur: | fríggjadagin 17. mai |
| Kr. Himmalsfarardagur: | hósdagin 30. mai |
| Grundlógardagur: | mikudagin 5. juni |
| Hvítusunnufrítíð: | leygardagin 8. juni - mánadagin 10. juni |
| Summarfrítíð: | fríggjadagin 28. juni – sunnudagin 18. August |
| ***Lagdur frídagur:*** | ***fríggjadagin 26. apríl*** |

Allir nevndu dagar omanfyri verða roknaðir sum frídagar. Harumframt verður ein evnisdagur fyri øllum lærarum og leiðslum í landinum í viku 45, tískil verður árliga skúladagatalið 197 dagar, av tí at næmingarnir fáa frí henda dagin. Lærararnir í Kvívíkar skúla skulu til evnisdag mikudagin 7. november.

## Tímatalva 1. flokkur 2018-2019

| | Mánad. | Týsd. | Mik. | Hósd. | Fríggjad. |
|---|---|---|---|---|---|
| 8 – 8.45 | Fø (HH) | Ro (HH) | Ha/li MP/TT | Fø (HH) | Kr (HH) |
| 8.45 – 9.30 | Fø (HH) | Ro (HH) | Ha/li MP/TT | Fø (HH) | Ro (HH) |
| 9.45 – 10.30 | Ro (HH) | Fø (HH) | Hmst (MP) | Ro (HH) | Fø (HH) |
| 10.30 – 11.15 | Ro (HH) | Fø (HH) | Hmst (MP) | Ro (HH) | Fø (HH) |
| 11.35 – 12.20 | ítr/svi (TT/MJ) | Fø (HH) | ítr/svi (TT/MJ) | Fø (HH) | Fø (HH) |

Flokslærari: Hallgerð L. Hansen, tlf: 723368. Skúlastova: Norðurstova

HH: Hallgerð, TT: Turið, MP: Malan Petersen, MJ: Maj-Britt Jacobsen

## Tímatalva 2.-3. flokkur 2018-2019

| | Mánad. | Týsd. | Mik. | Hósd. | Fríggjad. |
|---|---|---|---|---|---|
| 8 – 8.45 | Fø (TR) | Ro (TR) | Ha/li (MP/TT) | Hmst (MP) | Ro (TR) |
| 8.45 – 9.30 | Fø (TR) | Ro (TR) | Ha/li (MP/TT) | Hmst (MP) | Ro (TR) |
| 9.45 – 10.30 | Ro (TR) | Fø (TR) | Kr (HH) | Ro (TR) | Fø (TR) |
| 10.30 – 11.15 | Ro (TR) | Fø (TR) | Kr (HH) | Fø (TR) | Fø (TR) |
| 11.35 – 12.20 | Ítr/svi (TT/MJ) | Fø (TR) | Ítr/svi (TT/MJ) | 2 fl: Fø, 3 fl: Da | Fø (TR) |
| 12.30 – 13.15 | | 3 fl: Da | | | |
| 13.25 - 14.10 | | 3 fl: Da | | | |

Flokslærari: Tórarinn N. á Rípuni, tlf: 515701. Skúlastova: Niðristova

TR: Tórarinn, TT: Turið, MJ: Maj-Britt, HH: Hallgerð, MP: Malan Petersen

# Tímatalva 4.-5. flokkur 2018-2019

| | Mán. | Týsd. | Mik. | Hósd. | Fríggjad. |
|---|---|---|---|---|---|
| 8 – 8.45 | Fø (MJ) | Ro (MP) | En (MJ) | Da (MJ) | Fø (MJ) |
| 8.45 – 9.30 | Fø (MJ) | Ro (MP) | Kr (HH) | Fø (MJ) | Fø (MJ) |
| 9.45 – 10.30 | Da (MJ) | N/T (MP) | Ítr/svi (TT/MJ) | Ro (MP) | Da (MJ) |
| 10.30 – 11.15 | En (MJ) | N/T (MP) | Ítr/svi (TT/MJ) | Ro (MP) | Da (MJ) |
| 11.35 – 12.20 | Sø (TR) | Fø (MJ) | Ro (MP) | N/T (MP) | En (MJ) |
| 12.30 – 13.15 | | Køk (HH) | | Ha/Li (MP) | |
| 13.25 – 14.10 | | Køk (HH) | | Ha/Li (MP) | |

Flokslærari: Maj-Britt Jacobsen, tlf: 224501. Skúlastova: Uppistova

MJ: Maj-Britt, MP: Malan Petersen, TR: Tórarinn, HH: Hallgerð, TT: Turið

# Tímatalva 6.-7. flokkur 2018-2019

| | Mánad. | Týsd. | Mik. | Hósd. | Fríggjad. |
|---|---|---|---|---|---|
| 8 – 8.45 | Fø (TT) | Ro (TT) | En (MJ) | 6 fl. n/t, 7 fl. samf | Ro (TT) |
| 8.45 – 9.30 | Fø (TT) | Ro (TT) | En (MJ) | 6 fl n/t, 7 fl samf | Ro (TT) |
| 9.45 – 10.30 | Da (TT) | Fø (TT) | ítr/svi (TT/MJ) | Fø (TT) | Da (TT) |
| 10.30 – 11.15 | Da (TT) | En (MJ) | ítr/svi (TT/MJ) | Ro (TT) | Da (TT) |
| 11.35 – 12.20 | Kr (HH) | Fø (TT) | Sø (TR) | En (MJ) | Fø (TT) |
| 12.30 – 13.15 | 6 fl. n/t, 7 fl. lív | Ha/li (MP) | | Køk (HH) | alisf. (TR) |
| 13.25 – 14.10 | Landal. (TR) | Ha/li (MP) | | Køk (HH) | alisf. (TR) |

Flokslærari: Turið á Tórgarði, tlf: 226114. Skúlastova: Frammistova

TT: Turið, HH: Hallgerð, TR: Tórarinn, MJ: Maj-Britt, MP: Malan Petersen

**Næminga/foreldraviðtalur:** Í inniverandi skúlaárið verða 2 næminga/foreldra viðtalur í hvørjum flokki. 2 lærarar verða til hvørja viðtalu, og vit viðmæla tykkum foreldrum, at næmingarnir koma við til viðtalurnar.

**Fyrru viðtalurnar verða skipaðar á henda hátt:**

1. flokkur: mánadagin 29. okt. (Lærarar: Hallgerð og Høgni)

2. & 3. flokkur: týsdagin 30. okt. og mikudagin 31. okt. (Lærarar: Tórarinn og Malan)

4. & 5. flokkur: hósdagin 1. nov. og mánadagin 5. nov. (Lærarar: Maj-Britt og Malan)

6. & 7. flokkur: týsdagin 6. nov. og hósdagin 8. nov (Lærarar: Turið og Maj-Britt)

**Seinnu viðtalurnar verða skipaðar á henda hátt:**

1. flokkur: mánadagin 25. mars (Lærarar: Hallgerð og Høgni)

2. & 3. flokkur: týsdagin 26. mars og mikudagin 27. mars (Lærarar: Tórarinn og Malan)

4. & 5. flokkur: mánadagin 1. apríl. og týsdagin 2. apríl (Lærarar: Maj-Britt og Malan)

6. & 7. flokkur: mikudagin 3. apríl og hósdagin 4. apríl (Lærarar: Turið og Maj-Britt)

20 minuttir verða settar av til hvønn næming.

**Skúlarenning:** Skúlarenning verður ein dag áðrenn heystfrítíðina, tá veðrið verður til vildar.

**Vika 38 - 41:** Floksforeldrafundir, tit fáa innkalling frá floksláraranum

**Næmingasamrøður:** Nærri kunning um hetta á floksforeldrafundinum, sí omanfyri.

**Mikukvøldið 14. november:** Felagsforeldrafundur, sum skúlastýrið skipar fyri

**Fríggjadagin 30. november:** Vit pynta stovurnar til jóla.

**Týsdagin 5. mars:** Ráðleggingardagur, næmingarnir hava frídag.

**Í viku 23 - 25:** Farið verður í seturskúla í hesum vikunum.

**6. mars - 12. apríl:** Allir skúlin hevur lesiløtu hvønn morgun fram til kl. 8:30.

**<u>Virðisgrundarlag:</u>**
*Vit vilja framá. Málið er: Menning og vøkstur fyri øll*

**Opinleiki**

At tankar, kenslur og meiningar verða greitt, týðiliga og skilliga orðaðar, soleiðis at vit hava eina felags fatan av hvørjar forðingar, møguleikar og avbjóðingar vit standa yvirfyri.

**Álit**

At vit gjøgnum opið og virðiligt samskifti vísa hvør øðrum sínámillum álit.

**Ábyrgd**

At hvør einstakur persónur við tilknýti til Kvívíkar skúla skal taka ábyrgd fyri,at skúlin ber framá til gagns fyri menning og breiðan vøkstur fyri okkum øll.

**Virðing**

At ymiskleikin hjá tí einstaka skal virðast, eins og felagsskapurin skal virðast gjøgnum felags reglur, mannagongdir og viðtøkur. Dentur verður lagdur á eitt opið, álitisfult og virðiligt samstarv millum øll, sum varða av skúlanum.

**Førleiki**

At vit lærarar støðugt menna okkara førleikar at undirvísa og vegleiða, soleiðis at vit á bestan hátt kunnu virka fyri, at hvør einstakur næmingur kann styrkjast í síni menning bæði fakliga, persónliga, sosialt og samfelagsliga.

**Gott arbeiðspláss**

At vit arbeiða miðvíst við at menna skúlan soleiðis, at hann verður eitt gott, trivaligt og mennandi arbeiðspláss bæði hjá lærarum og næmingum.

Her vilja vit altíð arbeiða fram ímóti:

- tryggleika og góðum trivnaði.
- menning og breiðum vøkstri fyri øll.